Mynd: Jan Müller/oljan.fo

Johan Dahl: Tættari samstarv við bretar um olju og orku

Jan Müller

26.11.2013 - 13:42

Oljan.fo

Jan Müller úr London. Mánadagin varð eitt týðandi stig tikið til at menna samstarvið millum Føroyar og Bretland á orku- og oljuøkinum, tá Johan Dahl, landsstýrismaður í olju- og orkumálum hitti ein av ovastu stjórunum í bretska orkumálaráðnum, Simon Toole. Ùrslitið av fundinum varð sera jaligt og gevandi.

“Vit høvdu ein sera góðan fund, sum snúði seg um oljusamstarv og samstarv á orkuøkinum sum heild, her serstakliga innan varandi orkukeldur,” sigur ein væl nøgdur landsstýrismaður í orku- og vinnumálum, Johan Dahl eftir fund við Simon Toole, stjóran í

DECC, (Department of Energy and Climate Change) sum er hægsti almenni stovnurin undir bretska orku- og oljumálaráðnum.

Fundurin fór fram í Whitehall í London, har øll stjórnarráðini halda til. Á fundinum vóru eisini Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi, Jóannes V. Hansen, sendiharri Føroya í Bretlandi og danski sendiharrin í Bretlandi, Claus Grube.

“Vit fingu eina frágreiðing um, hvussu bretar hugsa sær at fáa mest burtur úr varandi orkukeldum, her m.a. bæði vindi, sjóvarfallsorku og møguligum elkaðali úr Íslandi. Eisini komu vit inn á spurningin, hvussu Føroyar kunnu gerast partur av eini verkætlan við einum elkaðali úr Íslandi umvegis Føroyar og Hetland til skotska meginlandið.”

Johan Dahl nevndi á fundinum arbeiðið, sum verður gjørt í Føroyum í hesum sambandi . Tað er so m.a. treytað av at kunna gera okkurt saman við Hetlandi eisini, og hetta er nakað, sum bretski orkustjórin vísti stóran áhuga og ynskti at kunna seg nærri um. Jarðfeingi hevur so fingið til uppgávu at kunna bretskar myndugleikar um føroysku ætlaninar og fyrireikandi arbeiðið, sum verður gjørt á Jarðfeingi.

Umframt varandi orkuna varð oljan eisini á skránni og varð her tosað um at fara undir eitt tættari samstarv við m.a. at lata hvørjum øðrum data frá kanningum, sum verða gjørdar báðumegin markið. Hetta fyri at føroyingar m.a. kunnu fáa vitan um møgulig fund hinumegin. Tvs. at her verður lagt upp til eitt samstarv millum føroyskar og bretskar myndugleikar, sum miðjar móti at kunna hvør annan um tað, sum fer fram í sambandi við bæði leiting og framleiðslu skamt frá markinum og ikki minst, har møgulig fund ganga tvørtur um markið. Higartil hevur tað verið so, at partarnir sjálvir skulu koma við vísindaligum prógvum fyri møguligum fundum hjá hinum fyri at fáa innlit. Tað verður nú broytt.

Johan Dahl sigur, at teir eisini bóru uppá mál spurningar so sum, hvar møgulig føroysk olja og gass skal flytast. Í dag sigur føroysk lóggáva, at føroysk olja og gass skal í land í Føroyum, men vísir tað seg, tá hetta verður aktuelt, at tað er betri fyri Føroyar at kanna aðrar loysnir so sum at flyta olju og gass til eitt nú bretskar terminalar, so verður tað gjørt. Hetta er sjálvandi nakað, sum verður gjørt í samráð við tey oljufeløgini, ið arbeiða í Føroyum, tí tey vilja sjálvandi eisini hava síni ynski.

Hóast tað er ríkiliga tíðliga at seta hol á slíkar spurningar, so metti Johan Dahl tað vera rætt av føroyingum at vera uppá forkant við slíkum spurningum eisini og at kanna alternativ til verandi lóg. Enn er tó eingin avgerð tikin um at broyta verandi lóggávu leggur landsstýrismaður dent á. Alt fer at verða gjørt við tí fyri eygað, at tað skal tæna føroyskum áhugamálum fyrst og fremst.

Teir umrøddu so eisini seinastu gongdina á oljuøkinum vestan fyri Hetland, har tað fara fram stórar útbyggingar á eitt nú Schiehallion og Clair feltunum umframt gassútbyggingin av Laggan Tormore feltinum. Eisini vísti bretski orkustjórin á, at Chevron hevur gjørt av at brúka meira tíð til at kanna útbygging av stóru Rosebank kelduni beint við føroyska markið og skapar hetta óvissu um útbyggingina.

Hetta er sjálvandi nakað, sum verður tikið í størsta álvara í DECC, sum fegið sær, at oljufeløg leita og byggja út fund í bretskum øki. Hann duldi ikki fyri heldur, at myndugleikarir vóru sera harmir um, at Statoil hevði tikið seg meira og minni úr økinum vestan fyri Hetland, nú teir hava selt part í Schiehallion og allan partin í Rosebank umframt at útseta aðrar útbyggingar í Norðsjónum. Hann skilti tó eisini væl Statoil, sum sjálvandi brúkar pening, har felagið metir seg fáa mest burturúr.

Johan Dahl nevndi á fundinum, at føroyingar eru sera fegnir um, at Statoil raðfestir Føroyar høgt og kunnaði hann bretska stjóran um tær boringar, sum verða í Føroyum komandi ár og annars um føroyska oljuleiting sum heild.

Seinnapartin í gjár varð Johan Dahl á fundi við stjóran í stóra og valdsmikla felagnum hjá bretsku oljuvinnuni, Oil & Gas UK, sum telur nærum hálva million limir. Lesið um henda týðandi fundin á oljan.fo seinni.

Myndir

Johan Dahl, landsstýrismaður í olju- og vinnumálum her saman við stjóranum í DECC, Simon Toole.

Við á fundinum vóru eisini føroyski sendiharrin í London, danski sendiharrin og stjórin í Jarðfeingi.